## Sjeynda DM-heitið til Gade

Peter Gade spældi sunnudagin DM-finalu í badminton móti Kenneth Johansen. Sum væntað, so gjørdist talan um favoritt-sigur á 2-0, men fyrsta settið lúrdi sensatiónin eina løtu. Tað eydnaðist tó Gade at taka hetta við 22-20, og í næsta settinum gjørdi hann skjótt av. Hetta endaði við 21-11 sigri til Gade, sum soleiðis kann rópa seg danska meistara fyri sjeyndu ferð.




## Til USA uttan lívverju

David og Victoria Beckham kunnu neyvan fáa lívverjar sínar við, tá flyta til USA, har maðurin skal spæla fótbólt komandi árini. Amerikonsku immigratiónsmyndugleikarnir hava nevnliga sýtt fyri at geva sonevnd green-card til teir átta lívverjarnar, sum parið hevur nýtt í fleiri ár. Myndugleikarnir meta, at hetta er eitt arbeiði, sum eins væl kann gerast av amerikanum sjálvum, og tí noyðist parið helst at finna sær nýggjar lívverjar.

Fleyr-Mjølnir 1-3 (20-25, 21-25, 25-18, 22-25):

# Mjølnir heldur fast í vónini

**Mjølnir vann uttan stórvegis trupulleikar ímóti Fleyr í meistaradeildini hjá monnum í vikuskiftinum, og við sigrinum halda teir fast um vónina at vinna meistaraheitið. NÚ eru teir bert eitt stig aftanfyri oddaliðið, ÍF**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Mjølnir skuldi vinna dystin ímóti Fleyr leygardagin fyri at halda fast í vónini um at fanga ÍF aftur í oddastríðnum, og hjá Fleyr ráddi eisini um at vinna. Um teir ætlaðu sær heiðursmerki í ár, so skuldu teir vinna dystin ímóti Mjølni fyri at hava nakran møguleika at fanga Fram aftur á triðja plássi.

### Mjølnir streyk avstað

Tað var tó oddaliðið úr Klaksvík, sum fekk betru byrjanina uppá dystin. Munurin í fyrsta setti var ikki tann heilt stóri, men Mjølnir vann seg eitt vet fram um Fleyr rættiliga tíðliga, og hesa leiðsluna varðveittu teir allan vegin. Mjølnir vann fyrsta sett 25-20, og so høvdu teir fingið eina góða byrjan uppá týdningarmikla dystin.

Í øðrum setti var gongdin júst tann sama. Heldur ikki hesaferð var serliga stórur munur á liðunum, men Mjølnir tóktist alla tíðina at hava munin. Teir vunnu sær aftur eina lítla leiðslu tíðliga í settinum, og sjálvt um Fleyr var væl við, so megnaði Mjølnir at halda fast allan vegin. Teir vunnu 25-21, og nú førdu teir 2-0.



*Mjølnir vann týdningarmikla dystin á Fleyr í bestu mansdeildini, og við hesum liva teir enn í vónini um at vinna meistaraheitið*

### Spenningur kom í

Fleyr vildi tó ikki gevast uttan víðari. Teir høvdu verið væl við í fyrstu settunum, og í triðja setti fingu teir úrslit fyri sítt stríð. Her vóru teir stutt og greitt betra liðið. Teir vunnið seg fram um rættiliga tíðliga, og spakuliga øktu teir um munin. Móti endanum var slett eingin ivi um, hvønn veg tað ber, og Fleyr vann eisini ein tryggan 25-18 sigur, og nú vóru teir brádliga við aftur í dystinum.

Fjórða sett gjørdist aftur rættiliga spennandi, men hesaferð var Mjølnir oman á. Liðini fylgdust at kalla allan vegin, men móti endanum dró Mjølnir frá. Teir vunnu fjórða sett 25-22, og sostatt tryggjaðu teir sær ein 3-1 sigur.

Við sigrinum halda teir fast um vónina at vinna meistaraheitið, og nú eru teir bert eitt stig aftanfyri oddaliðið úr Fuglafirði.

## Pólverji skal hvessa FSV

FS Vágar hevur til hetta kappingarárið fingið tilgongd av ein pólverskum áleypara, sum ætlandi skal verða ein týðandi liður í strembanini eftir plássi í Formuladeildini komandi kappingarár.

Andrzej eitur spælarin, og hann kom til landið við Norrønu í farnu viku. Umvælingin av Norrønu hevði annars við sær, at spælarin var seinkaður í tvær vikur, men nú er hann so til reiðar at tørna út fyri nýggja felagið. Tað skuldi eftir ætlan verið móti B71 um vikuskiftið, men tann dysturin varð avlýstur vegna kava.

**-mørk**

## Guttorm vann cross-renning

Leygardagin varð kappast í cross-renning á Toftum. Teinurin, sum varð runnin, var sjey kilometrar til longdar, og fyrstu um máið var Guttorm Sørensen, sum brúkti 29.00 minuttir um teinin. Sam Vang kom næstur á mál við tíðini 29.40, og honum á baki kom Jónsvein Herup Olsen við 31.41.

**-mørk**

## Vlada til VB/Sumba

Fyrrverandi Skála-málverjin, Vlada Filipovic, skal í ár verja málið hjá VB/Sumba. Suðuroyingarnir høvdu í fjør Macyn Dawid millum stólparnar, men hesin verður komandi árið at síggja í HB. Vlada kom til Føroya í fyrraárið, og bæði tá og í fjør vardi hann málið hjá Skála.

**-mørk**

Fram-SÍ 1-3 (21-25, 25-19, 14-25, 20-25):

# SÍ fekk sín næsta sigur

**SÍ vann heldur óvæntað á Fram í meistaradeildini hjá monnum leygarkvøldið, og við hesum fingu teir sín fyrsta sigur í endaspælinum**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fram var stórur favorittur, tá ið teir tóku ímoti SÍ í meistaradeildini hjá monnum fríggjakvøldið. SÍ hevur tó í fleiri umførum víst, at teir saktans kunnu vera við, men í avgerandi løtunum hava teir tó ikki verið nóg neyvir.

Fríggjakvøldið riggaði tó betur hjá teimum. Teir vunnu nevniliga dystin á Fram, og sostatt tryggjaði teir sær sín fyrsta sigur í endaspælinum.

### SÍ setti dagsskránna

Dysturin var ikki nógvar bóltar gamal, tá ið SÍ vísti, at teir ikki ætlaðu at geva seg uttan at kempa í dystinum í meistaradeildini hjá monnum ímóti Fram. Teir løgdu nevniliga betri fyri í fyrsta setti, og teir megnaðu at vinna seg nøkur stig fram við Fram.

Fram royndi tó at hanga í, men hesaferð gjørdust teir ov stuttir. SÍ helt leiðsluni allan vegin, og teir vunnu fyrsta settið 25-21.

Í øðrum setti var Fram tó nógv betri við, og nú høvdu teir fingið gongd á. Teir løgdu betur fyri enn ungu sørvingarnir, og sum settið leið, øktu teir um munin. SÍ var tó hampiliga væl við alt settið, men leiðslan hjá Fram var tó ongantíð í vanda. Fram vann annað sett 25-19, og so stóð aftur á jøvnum millum liðini.

### SÍ setti Fram uppá pláss

Nú tóktist Fram veruliga at hava fingið gongd á, men SÍ vildi tað tó øðrvísi. Í triðja setti løgdu teir fyri sum eitt óløgi, og teir vunnu sær eina trygga leiðslu mitt í settinum. Henda bleiv bara størri og størri, og at enda vann SÍ ein ógvuliga tryggan 25-14 sigur í triðja setti, og her var slett eingin ivi um úrslitið í hesum settinum.

Í fjórða setti var SÍ aftur oman á. Fram var tó heldur betri við í hesum settinum, men spenningurin kom ongantíð veruliga í. Fyrstu løtuna fylgdust liðini, men so við og við tók SÍ yvir. Teir vunnu sær eina lítla leiðslu, og móti endanum gjørdist greitt, at her fóru sørvingarnir at vinna. Teir vunnu eisini fjórða settið 25-20, og sostatt tryggjaði tær sær sín fyrsta sigur í endaspælinum í bestu mansdeildini.